FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 20. august 2020
J. nr.: 20/00363
Viðgjørt: MM

Svar upp á fyrispurning nr. 2/2020 eftir tingskipanini § 52a

Fyrispurningur frá Jóhannis Joensen, løgtingsmanni, settur Jørgen Niclasen, landsstýrismanni í fíggjarmálum, um ferðsluviðurskiftir í Vágum

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hvørjar ætlanir hevur landsstýrið viðvíkjandi farleiðini til flogvøllin?
2. Hvørjar ætlanir hevur landsstýrið á vegastrekkinum við Leynatunnilin hvat viðvíkur trygd fram við landsvegi?
3. Hvørjar ætlanir eru í samband við trygd og ferðslu í Vágum? Her verður hugsað um rundkoyringar o.a.
4. Er samstarv við kommunurnar í Vágum um at tálma ferðsluni og virka fyri tryggum ferðsluviðurskiftum á vegastrekkinum til og frá flogvøllinum?
5. Hvør er ætlanin við landsvegnum í Sørvági og út til Bø og Gásadals hvat viðvíkur trygd og ferðslu?

Svar:

Spurningur 1:

Strandfaraskip Landsins upplýsir, at í samband við nýggja 7 ára sáttmálan hjá Bygdaleiðum og at Eysturoyartunnilin verður liðugur, hevur verið umhugsað at umskipa ferðaætlanina, bussar og bussførarar, herundir økja um tænastuna á leiðunum 300 og 400 og møguliga skapa eina snarleið til flogvøllin. Harumframt verða ymisk rakstrarmennandi átøk sum nýggj bíleggingarskipan og prísskipan roynt komandi ár.

Spurningur 2:

Landsverk upplýsir, at í løtuni eru ikki ávísar ætlanir viðvíkjandi vegastrekkinum við Leynatunnilin.

FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Spurningur 3:

Ferðslan á landsvegnum við Sørvágsvatn er økt frá 2010 til 2019 við uml. 40% ella uml. 3.200 bilar um samdøgri, men í ár er hon minkað til uml. 2.300 bilar um samdøgri orsakað av COVID-19, sum millum annað hevur viðført minni ferðslu til flogvøllin.

Í Samferðsluætlanini fyri 2018 – 2030 er greitt frá nøkrum batum á landsvegunum í Vágum, og umhugsað hevur verið at gera eina rundkoyring við Giljanes. Í løtuni eru tó ikki ávísar ætlanir hesum viðvíkjandi.

Spurningur 4:

Seinastu 10 árini hava verið gjørd fleiri ferðslutrygdarátøk í Sandavági, Miðvági og Sørvági. Síðsta verkætlanin var at bøta um skúlavegin millum Sandavág og Nesveg við Giljanes. Hetta er gjørt í samráð við kommunurnar.

Spurningur 5:

Landsverk upplýsir, at í løtuni eru ikki ávísar ætlanir viðvíkjandi hesum teininum.

Tinganes, 20. august 2020

Jørgen Niclasen
landsstýrismaður í fíggjarmálum